# Frelsunarherurin 50.000 kr. frá LC Eysturoy

**Mánakvøldið var hugnalig samkoma í Kafé Inn við Norðskála, har Lions C Eysturoy handaði Frelsunarherinum ein kekk á 50.000 krónur til tað megnararbeiði, sum felagið ger fyri heimleys í Føroyum við sínum Herbergi í høvuðsstaðnum**

GÁVA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var formaðurin í Lions C Eysturoy, Poul Rustin, sum handaði kekkin, og tað var ein takksamur, Sámal Jákup Joensen, sum tók ímóti honum.

Sámal Jákup er leiðari hjá Frelsunarherinum í Føroyum.




*Her handar Poul Rustin, sum er formaður í Lions C Eysturoy, Sámal Jákupi Joensen, sum er leiðari hjá Frelsunarherinum í Føroyum, kekkin á 50.000 krónur.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Stórur áhugi

Gávan, sum Lions C Eysturoy gevur felagsskapinum, er nettoinntøkan frá páskaframsýningini, sum Lions-felagið í Eysturoy á hvørjum ári hevur í Runavíkar skúla.

Á framsýniningini hesaferð vístu eini 50 fólk fram sínar málningar og myndir, sum plaga at vera út við 400 í tali.

– Framsýningin hevur stóran áhuga, og tí noyðast vit at seta mark fyri, hvussu nógvar málningar hvørt einstakt listafólk kann hava við. Vit plaga at siga, at eini 4-5 málningar ella myndir er hóskandi, men tey eru nógv, sum á hvørjum ári eru til reiðar at koma við fleiri listaverkum, sigur Poul Rustin.

Á framsýningini verða eisini lutaseðlar seldir, eins og atgongumerkið er ein lutaseðil.

Poul sigur, at Lions C Eysturoy fær 15% av søluni av listaverkunum, men í summum førum lata tey, sum sýna fram, heldur eitt listaverk, sum svarar til prosentini.

– Tað hendir eisini, at onkur framsýnari bæði letur prosentini og eitt listaverk aftrat, sigur hann.

### Hugtakandi

Sámal Jákup Joensen segði, at honum untist ikki at vera við til sjálva framsýningina í Runavík, men kona hansara var við, og tað var hornorkestrið hjá felagsskapinum eisini.

– Tey vóru ógvuliga hugtikin av framsýningini, tí umframt kend nøvn innan okkara listarliga umhvørvi, høvdu eisini vanlig fólk – um ein so kann siga – høvi at sýna fram sínar frálíku myndir, og tað setir ein serligan dám á eina slíka framsýning.

Leiðarin hjá Frelsunarherinum segði, at gávan kemur væl við, og at felagsskapurin hevur nógv at brúka hana til.

– Vit hava nógv hol at tippa, segði hann.

Poul Rustin segði seg vóna, at Frelsunarherurin, sum eitt nú ger eitt gott arbeiði fyri tey heimleysu í Føroyum, fær brúkt peningin so væl sum gjørligt.

Á samkomuni í Kafé Inn við Norðskála varð borðreitt við leskiligum mati til tey umleið 17 fólkini, sum komin vóru saman til handanina av kekkinum.

### Afturvendandi tiltøk

Páskaframsýningin hjá Lions C Eysturoy hevur eftirhondini nógv ár á baki. Fyrstu ferð, felagið tók stig til listaframsýning í Eysturoy, var í 1978, og síðan 1980 hevur vælumtókta og væl vitjaða framsýningin verið í Runavíkar skúla.

Lions C Eysturoy er stovnað 25. oktober 1969, og síðan 1970 hevur verið skipað fyri árligari kappsigling á Skálafjørðinum.

Hini Lions-feløgini í Føroyum eru LC Tórshavn, sum er stovnað 19. november 1966, LC Klaksvík (11. mars 1978), LC Vágar (14. apríl 1986) og LC Suðuroy, sum er stovnað, 14. juni 1986.

# Ein kvinna millum menn

**Lions-feløgini kring landið eru feløg, har bert menn eru í leiðsluni. Men eitt undantak er. Tað er felagið, LC Eysturoy, sum í síni reglugerð eisini kann hava kvinnulig umboð í leiðsluni**

LIONS CLUB
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Lions-feløgini í Føroyum, sum eru fimm í tali, eru at kalla øll mannað við monnum. Reglugerðirnar hjá feløgunum siga, at tað eru bert menn, sum kunnu verða í leiðsluni. Tó er eitt undantak. Tað er Lions C Eysturoy. Hetta er einasta Lions-felagið í Føroyum, sum sambært reglunum kann hava kvinnulig umboð í leiðsluni.



*Eyðbjørg Thorleifsson er einasta kvinnuliga umboð í Lions-feløgunum í Føroyum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Og tað hevur felagið eisini.

Kvinnuliga umboðið hjá LC Eysturoy er Eyðbjørg Thorleifsson, sum er grannskoðari og í fleiri ár hevur havt grannskoðaravirki á Skála.

Eyðbjørg er onnur kvinnan, sum hevur havt sæti í leiðsluni í Lions C Eysturoy, men í løtuni er hon einasta kvinnan yvirhøvur, sum umboðar eitt Lions-felag í Føroyum.

### Trívist væl

– Mær dámar væl at fáast við arbeiði, sum Lions-feløgini takast við, og eg trívist væl millum mannfólkini, sum annars eru í leiðslu felagsins.

Hon sigur, at í sínum arbeiði sum grannskoðari, eru flestu viðskiftafólkini mannfólk, tó at virkið eisini hevur viðskiftafólk, sum eru kvinnur.

– Í mínum arbeiði eri eg so von við at samskifta við mannfólk, og tí er tað eingin sum helst trupulleiki, at eg í løtuni eri einasta kvinna í Lions C Eysturoy, sigur Eyðbjørg Thorleifsson.

### Tók sína tíð

Umboð fyri Lions C Eysturoy siga, at tað tók sína tíð at fáa undirtøku fyri at broyta reglugerðina, soleiðis at felagið eisini kann hava kvinnulig umboð í leiðsluni.

– Men hetta eydnaðist, og sambært skipanini er einki tal ásett, hvussu stórur partur skal vera menn, og hvussu stórur partur av leiðsluni kann vera kvinnur, siga tey í Lions C Eysturoy.



# Nógv gull liggur við rennisteinin

**– Talið av gistingum á Herberginum hjá Frelsunarherinum í Havn, veksur alsamt. Í 1998, tá Herbergið byrjaði, vóru tilsamans 662 gistingar, men í 2003 vóru tær ikki færri enn 2.764 í tali, sigur Sámal Jákup Joensen, sum harmast um, at tær tvær miljónirnar, sum upprunaliga vórðu settar á fíggjarlógina til heim til heimleys í Føroyum, eftir uppskoti frá fíggjarnevndini vórðu skornar burtur aftur**

HEIMLEYS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Sámal Jákup Joensen er vágbingur, men tað eru 46 ár, síðan hann fór úr Vági. Av hesum hevur hann arbeitt 30 ár í Noregi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Talið av gistingum á Herberginum hjá Frelsunarherinum í Havn veksur alsamt. Í fjør vóru ikki færri enn 2.764 gistingar. Talan var um tilsamans 45 fólk, sum gistu á Herberginum. Av hesum vóru 38 menn og 7 kvinnur. Umframt hesi, hevði Herbergið í fjør 477 vitjanir, og á dagsentrinum vóru tilsamans 2.477 fólk til døgurða og annað.

Herbergið hevur nøkur hagtøl um brúkararnar seinasta ár.

Tølini vísa, at 8 av teimum 45, sum gistu, hava egnan bústað, 7 búgva í búfelagsskapi, 16 komu av bygd og hava bústað har, 5 halda til hjá vinum og í Herberginum, og 7 hava bert Herbergið at halda seg til og hava sínar ognarlutir har.

Hagtølini vísa eisini, at av teimum 45, sum gistu á Herberginum síðsta ár, vóru tvey deyð við árslok 2003.

Ein talva, sum Frelsunarherurin hevur gjørt, vísir eisini, at talið av gistingum vaks úr 2.176 í 2002 upp í áðurnevnda tal, 2.764, í 2003.

Hetta eru stór tøl, tá ið havt verður í huga, at umstøðurnar í Herberginum eru rættiliga trongligar.

– Tað mesta, vit hava havt inni í senn til gistingar, er 15, men tað er nógv meira, enn pláss er fyri. Hetta hevur verið gjørt fyri at fólk ikki skulu liggja úti, sigur Sámal Jákup Joensen, leiðari á Frelsunarherinum í Føroyum.

### Nýggj byrjan

Á móttøkuni í Kafé Inn við Norðskála mánakvøldið, tá ið Lions C Eysturoy handaði Frelsunarherinum kekkin á 50.000 krónur, greiddi Sámal Jákup í stuttum frá tí arbeiði, sum altjóða felagsskapurin ger. Hann greiddi eisini frá nøkrum av teimum hendingum, hann hevur verið úti fyri tey 30 árini, hann arbeiddi fyri Frelsunarherin í Noregi.

– Eg eri vágbingur, men tað eru 46 ár, síðan eg fór úr Vági, og harav havi eg starvast 30 ár í Noregi.

Sámal Jákup segði, at arbeiði hjá Frelsunarherinum, sum hevur sítt grundstøðið í Bíbliuni, fer fram um allan heimin.

– Vit lata gleðiboðskapin og tað sosiala arbeiði, vit gera, ganga hond í hond, sum hann tók til.

### Málsetningurin

Hann segði, at málsetningurin hjá Frelsunarherinum fyri arbeiði á Herberginum, er hesin:

"Ikki bert ein song fyri náttina, men ein nýggj byrjan…"

– Tann heimleysi hevur sum oftast lítla sjálvsvirðing, og hjá mongum teirra er tað ofta trupult at finna eitt nýtt mál fyri lívinum. Tað er her, tann kristni boðskapurin er so neyðugur. Vit hava ein Guð, sum elskar okkum treytaleyst, og tað er ongantíð ov seint at byrja av nýggjum.

Sámal Jákup vísti á, at sambært kanningum er arbeiðsterapi í mongum førum nógv effektivari enn samtaluterapi.

– Tí er tað so umráðandi, at tey, sum leita okkum upp í neyðini, hava okkurt at fara upp til.

Men so langt eru vit í Føroyum tíverri ikki komin enn.

Hann segði, at nógv kundi verið at fortalt um tíðina, hann var í Noregi og um tað arbeiði, sum Frelsunarherurin ger kring um heimin.

### Svong menniskju

Stovnarar av Frelsunarherinum, vóru hjúnini, William og Cathrine Booth í Onglandi.

– Sosiala arbeiðið var ógvuliga týdningarmikið fyri William, tí sum hann segði: "Hvat nyttar tað at tosa við svong menniskju…"

William ásannaði, at fólk, sum vóru ringast fyri í samfelagnum, máttu hava onkustaðni at búgva, tey máttu hava mat, klæðir og kunna vaska sær.

– Frelsunarherurin ásannaði longu beinanvegin, at evangeliið og hjálpin máttu ganga hond í hond.

Í Noregi var Sámal Jákup eitt nú leiðari fyri einum heimi, sum tók sær av neyðstøddum. Her starvaðist hann í átta ár.

– Vit høvdu ein garð við 40 neytum, nógvum flogfenaði og einum verkstaði. Her kundu tey, sum búðu á heiminum, koma upp hvønn morgun at gera okkurt. Hetta hevði stóran týdning fyri hesi neyðars menniskju, ið annars ikki høvdu nógv at taka sær fyri. Eg vildi ynskt, at vit høvdu pening í Føroyum, soleiðis at hesi fólk kundu havt okkurt at farið upp til. Hetta hevði givið teimum eitt størri innihald.

### Týdningurin

Sámal Jákup segði, at hann hevði við nógv ymisk fólk at gera, meðan hann starvaðist í Noregi.

– Eitt nú høvdu vit ein persón, sum var dømdur í 21 ára fongsul fyri at hava dripið 24 fólk við eituri.

Hann vísti á, at sjálvur át hann mat og drakk av tí, sum hesin kom við, meðan hann var hjá teimum.

– So nógv kunnu fólk broytast, og so stórt álit kanst tú fáa sjálvt á teimum, sum hava framt størstu illgerðirnar.

Sámal Jákup vendi sær til Poul Rustin, sum er formaður í Lions C Eysturoy og hevur matstovu á Muntra í Fuglafirði:

– Hvat sigur ein arbeiðsgevari, um ein tílíkum persónur, sum hevur sitið í geglinum í fleiri ár fyri at hava eitrað onnur menniskju, kemur og biðir um arbeiði??

Leiðarin í Frelsunarherinum segði, at sjálvsagt himprast arbeiðsgevarin og er betonkiligur.

– Men kemur ein slíkur persónur og sigur, at hann hevur arbeitt hjá Frelsunarherinum í eitt ár, hevur viðkomandi hóast alt nøkur betur kort á hondini – enn um fongsulsrevsingin er tað einasta, ið liggur aftanfyri.

### Nógv gull

Sámal Jákup segði, at nógv dømi eru um fólk, sum hava ligið við rennisteinin, ið seinni eru vorðin góðir samfelagsborgarar.

– Nógv av hesum fólkum eru ógvuliga skilagóð, men umstøður av ymiskum slagi førdu til, at tey endaðu, sum tey gjørdu. Eitt kann eg siga frá mínum royndum í hesum arbeiði: Tað liggur nógv gull við rennisteinin, segði Sámal Jákup Joensen.